# Alfred fremstur hjá Sambandinum í Eysturoy

**– Eg eri bilsin og ógvuliga takksamur, sigur toppskorarin hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy**



*– Eg hevði væntað, at Sambandsflokkurin fór at fáa eitt gott val í Eysturoy, men eg hevði ikki væntað, at eg persónliga fór at fáa so nógvar atkvøður, sigur Alfred Olsen*

LØGTINGSVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Løgtingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy, Alfred Olsen, hevði eitt ógvuliga gott val týsdagin. Hann fekk 444 persónligar atkvøður og gjørdist fyrst valdur hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy. Næstur honum gjørdist Edmund Joensen, sum fekk 430 persónligar atkvøður og varð afturvaldur. Á triðja plássi hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy var Edva Jacobsen í Fuglafirði.

Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at Alfred er toppskorari hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy; tað var hann eisini á løgtingsvalinum fyri 4 árum síðan. Tá fekk hann 388 atkvøður, meðan Edmund Joensen fekk 326.

Størsti atkvøðuslúkurin í Eysturoy gjørdist annars Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum, sum fekk 448 atkvøður – ella fýra atkvøður fleiri enn Alfred.

Sosialurin royndi at fáa orð á Tórbjørn mikumorgunin, men tað eydnaðist tíverri ikki.

### Alfred sera væl nøgdur

Alfred Olsen er vegna Sambandsflokkin sera væl nøgdur við úrslitið av løgtingsvalinum.

– Vit høvdu eitt ógvuliga gott val í Eysturoy, og flokkurin hevði stóra framgongd í atkvøðutali. Eg hevði væntað, at flokkurin fór at fáa eitt gott val hesaferð, men eg hevði ikki væntað, at eg persónliga fór at fáa eitt so gott val. Eg eri bilsin og ógvuliga takksamur fyri persónliga stuðulin, sigur løgtingsmaðurin.

Í Nes kommunu fekk Sambandsflokkurin tilsamans 384 atkvøður, harav Alfred fekk tær 295. Listin fekk 41 atkvøður í Nes kommunu, Edmund Joensen 17 og Jákup Lamhauge 12.

# Eitt stórt bakkast fyri borgarstjóran í Vági

*– Kemur nú ein onnur samgonga framat við øðrum flokkum, stúri eg veruliga fyri øllum teimum útbyggingum, sum farast skuldi undir í í Suðuroy, sigur Jógvan Krosslá*



**Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, dylir ikki fyri, at hann er ógvuliga vónbrotin av, at hann bara fekk 82 atkvøður á løgtingsvalinum týsdagin**

LØGTINGSVALIÐ 2002
*Áki Bertholdsen*

– Hetta var eitt stórt vónbrot.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági er ein ógvuliga vónbrotin maður.

Hann stillaði upp til løgtingsvalið týsdagin á tjóðveldislistanum í Suðuroy, men tað slapp hann ikki væl frá.

Hann fekk ikki meiri enn 82 atkvøður og tað er ikki meiri enn gott helvtin av tí, hann fekk á valinum í 1998, tá ið hann eisini stillaði upp og fekk yvir hálvtannaðhundrað atkvøður.

Sostatt kann Jógvan Krosslá ikki stilla seg í røðina av borgarstjórum, sum fingu eitt gott val, eitt nú borgarstjórin tann í Skopun og tann í Hvalvík.

– Hetta var eitt stórt bakkast fyri meg sum borgarstjóra, tað er ikki yvir ar dylja, sigur Jógvan Krosslá.

Hann sigur, at hann leggur onki í, at hann ikki var valdur, tí hann fegnast stórliga um, at tað eydnaðist tjóðveldisflokkinum at varðveita løgtingsumboðið í Suðuroy.

Hann leggur afturat at hann er fullgreiður yvir, at hetta var eitt løgtingsval og at tað er øðrvísi enn eitt býráðsval og á seinasta býráðsvalið fekk hann 176 atkvøður.

Hann uggar seg eisini við, at hann heldur at ein orsøk til vánaliga úrslitið kann vera tann, sum nógvir vágbingar hava boðað honum frá, at teir vilja ikki av við hann sum borgarstjóra og at teir tí ikki fóru at atkvøða fyri honum til løgtingsvalið.

– Men so leingi tú ert í politikki, og ikki minst so leingi tú ert borgarstjóri, hevur tað stóran týdning, at tú fær undirtøku, men ta undirtøkuna fekk eg altso ikki frá vágbingum hesuferð, viðgongur hann.

– Tað er synd at siga, at vágbingar tóku undir við borgarstjóra teirra og tað eri eg vónbrotin av, sigur hann.

– Men tað skerst heldur ikki burtur, at tað er veljarin, sum hevur avgerðina og tann rættin virðir hann fult út.

Hann sigur, at hetta løgtingsvalið er eitt fullgott dømi um, at tað er ikki neyðugt hjá politikarum at avrika so nógv fyri at verða valdur, tí tað kann gera akkurát tað sama, sigur hann, uttan at útgreina tað nærri.

Hann sigur, at hann nú hevur verið borgarstjóri í Vági í 12 ár og tað hevur verið ein strævin tíð, har Vágur kom úr ringastu kreppu nakrantíð.

– Og eg haldi ikki, at hendan tíðin átti at ført til eina so stóra afturgongd í atkvøðutalið.

### Stúrir

Men var valið vánaligt fyri Jógvan sjálvan, heldur hann, at tað eisini var vánaligt fyri Suðuroynna sum heild.

Hann vísir á, at í valskeiðnum, sum nú er farið, eru stórar útbyggingar í Suðuroynni lagdar til rættis, eitt nú miðnámsskúli í Vági, djúphavn í Vági, samferðsluhavn á Tvøroyri og tunnil ímillum Øravík og Hov.

– Eg haldi, at tað hevði verið ómetaliga týdningarmikið fyri Suðuroynna at hildi fast um samgonguna, sum sat, fyri at kunna hildið fram við hesum verkætlanunum.

– Men kemur nú ein onnur samgonga framat við øðrum flokkum, stúri eg veruliga fyri hesum útbyggingum, sigur Jógvan Krosslá.



# Tá ein hurð fer aftur, fer onnur upp



*Sámal Petur í Grund fall á løgtingsvalinum týsdagin. – Nú hurðar lata aftur, lata aðrar hurðar seg upp, sigur hann.*
*Sámal Petur sigur, at møguliga er hann tøkur, um boð verða eftir honum sum landsstýrismanni, tá nýggj samgonga er skipað*

**– Eg trúgvi, at míni persónligu viðurskifti eru høvuðsorsøkin til vánaliga valúrslitið hjá mær, sigur Sámal Petur í Grund**

LØGTINGSVALIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Landsstýrismaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Sámal Petur í Grund, fall á løgtingsvalinum týsdagin. Kári Højgaard, sum seinastu mánaðirnar hevur sitið á tingi fyri Sámal Petur, fekk 169 persónligar atkvøður. Tá ið avtornaði, vóru bert 99 atkvøður í skjáttuni hjá Sámal Peturi og 95 hjá Lassa Klein á triðja plássi. Á fjórða og fimta plássi hjá Sjálvstýrisflokkinum í Eysturoy vóru Kenneth Rasmussen við 73 og Dánjal Petur Hansen (Piddi) við 51 atkvøðum.

Sjálvstýrisflokkurin, sum hevði tvey umboð á tingi undan valinum, misti annan sessin og hevur bert eitt umboð eftir. Ta einu løtuna var líkt til, at Eyðun Eltør í Klaksvík gjørdist maðurin, sum einsamallur skuldi umboða flokkin á tingi næstu fýra árini, men tá ið saman um kom, fekk Javnaðarflokkurin ein eykavaldan í Suðurstreymi, nevniliga Kristian Magnussen.

Tískil er Kári Højgaard, sum annars er postmaður í Saltangará, nú maðurin, sum skal bera Sjálvstýrisflokkin víðari fram á leið.

### Persónligu viðurskiftini

Sámal Petur heldur, at tað fyrst og fremst eru hansara persónligu viðurskifti í samband við skilnaðin frá fyrrverandi konuni, Ásu, sum eru atvoldin til vánaliga valúrslitið.

– Men tað hevur avgjørt eisini havt sín týdning, at valstaðið í Søldarfirði er niðurlagt, tí hesum hava fólk sett seg harðliga upp ímóti. Eg veit um fólk, sum ikki fóru á val, tí valstaðið í bygdini er niðurlagt, sigur Sámal Petur.

Í Runavíkar kommunu hava verið fleiri valstøð, men undan hesum valinum avgjørdi býráðið, at ítróttarhøllin skuldi vera valstaður hjá øllum borgarum í kommununi.

Áður kundu fólk velja í Søldarfirði, Lamba, Glyvrum, Rytuvík og Æðuvík.

Sámal Petur ivast ikki í, at tað hevur gingið útyvir hansara persónliga atkvøðutal, at fólk í Søldarfirði ikki sluppu at velja í skúlanum í Søldarfirði.

Tað er tó ikki sannlíkt, at tað hevði bjargað Sámal Peturi tingsessin aftur, um søldfirðingar sluppu at velja í Søldarfirði, tí til tess var munurin millum hann og Kára ov stórur.

Sámal Petur heldur annars ikki, at stríðið, sum hevur verið í Sjálvstýrisflokkinum, hevur havt nakran serligan týdning fyri hansara støðu í Eysturoy.

– Eg haldi ikki, at eysturoyingar skuldu havt so stórar trupulleikar við tí, sum er hent, sigur hann.

### Hurðar latast upp

Sámal Petur sigur seg ikki vera so ógvuliga vónsviknan, nú greitt er, at annar maður er valdur í hansara stað.

– Eg trúgvi, at Kári hevur gjørt eitt ógvuliga stórt arbeiði undan valinum fyri at fáa fólk at taka undir við sær, og tað er alla æru vert. Eisini haldi eg, at hini valevnini hjá okkum høvdu eitt óføra gott val -– ikki minst tey, sum lótu seg stilla upp fyrstu ferð.

Sámal Petur sigur, at hetta hevur verið ein ógvuliga strævin tíð.

– Nú hurðar lata aftur, lata aðrar hurðar seg upp, sigur hann.

Spurdur, um hann aftur tekur landsstýrissess, um tað kemur at standa honum í boði, sigur Sámal Petur, at tað er ikki óvist.

– Eg havi tær royndirnar, sum skulu til – fyrst sum landsstýrismaður í samferðslu- og mentamálum í nøkur ár og nú sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum í stívliga eitt ár. Men lat okkum nú fyrst síggja, hvat spyrst burtur úr samgongusamráðingunum, sum verða í næstum. Í øllum førum fari eg at umhugsa støðuna, um ein landsstýrissessur stendur mær í boði til ta tíð, sigur hann.

Sámal Petur í Grund sigur, at tað er strævið at vera landsstýrismaður við lítlum baklandi, og nú flokkurin bert hevur eitt umboð á tingi, verður tað ikki minni strævið, um flokkurin kemur í samgongu og fær landsstýrissess.




Sjálvtøkan í Hornabø er nú flutt innandura.
Hon er opin hvønn dag frá kl. 6.00 til kl. 24.00.
Gjaldskortið er lykil til dyrnar.
Øll gjaldskort kunnu nýtast.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo